# Jól á afturlatnari deild

FILMUR
*Tíðindaskriv*

Filmsfelag Norðurlandahúsins KLIPP er í jólahýri. Mikudagin hin 3. desember klokkan 20:00 sýnir felagið triðja filmin í vetrarrøðini. Hann er norskur, fer fram á sálarsjúkrahúsi upp undir jól og ber heitið "Himnarúmd".

Filmurin, sum hevur upprunaheitið "Himmelfald" (Gunnar Vikene 2002), skrivar seg inn í ta nýskaptu norsku filmtraditión, sum eitt nú við filminum "Elling" (Petter Næss 2001), fylti nýtt innihald í kendar filmar sum "One flew over the Cuckoo's nest" (Milos Forman 1975).

Bæði ummælarar og áskoðarar hava tikið serstakliga væl ímóti hesum



*Kristoffer Joner er Reidar í filminum »Himnarúmd«*



*Leikkstjórin Gunnar Vikene verðurmettur at verða nýggja stóra navnið innan unga norska filmslist*

nýggja norska filmi, sum eisini er seldur til fleiri onnur lond. Á einastu burturav norðurlendsku filmsstevnu, Nordische Filmtage í Lubeck, fekk filmurin í frana mánaða áskoðaravirðislønina.

Leikstjóri er hin ungi Gunnar Vikene, ið verður mettur sum nýggja stóra navnið innan norska filmslist. Hann letur leikin fara frama á psykiatriskari deild, beint upp undir jól. Í leiklutunum síggja vit norsku leikararnar Kristoffer Joner og Mariu Bonnevie, og kenda danska leikarin Kim Bodnia, ið spælir impotentur lækni.

Hugvekjandi jólafilmurin "Himnarúmd" verður sýndur í Norðurlandahúsinum mikudagin hin 3. desember 2003.

**Gongdin í filminum**

Juni og Reidar gera seg til reiðar at halda jól. Tey búgva á Solihøgda, sum er staður fyri fólk, ið eru annarleiðis. Juni kunngerð at deyðin er í durinum, men fyrst skal hon hava jólagávurnar. Reidar, sum óttast at fáa ein meteor í skallan, hevur sett sær fyri at bjarga Juni, tá hon um halguna skal taka lívið av sær við eldsløkkingarútgerðini á deildini.

Johannes er sálarlækni á Solihøgda. Hann er impotentur, men fær hýruvognssjafførin Tummas at nøkta kynsliga tørvin hjá konuni Vígdis. Men ólukkutíð, í jólahalguni gerast Tummas og Vígdis góð. Alt ov góð. Men hýruvognsførarin, sum fyrsta dagin skal byrja á Politiskúlanum, er eitt tjóðsvætti, sum rýmir frá Vígdis og fer til Juni. Men hon gevur honum nevan.

Heilt sperdur verður Tummas, tá Wong, sum er úr Korea, legst inn á hann. Vinkonan Siw hevur sett hann á dyr og nú má hin fremmandi Wong látast sjúkur og sleppa inn á Solihøgda, skal hann fáa upphihaldsloyvi.

Mamma Reidar, hin minnisveika Ruud, hevur júst fingið boð frá myndugleikunum, at hon verður heinta og skal leggjast inn á sjúkrahús. Hon rýmur út í jólanáttina, undan løgreglu og heimahjálpini Vígdis.





Gist tríggjar nætur í Reykjavík - fríggjadag til mánadag

Viking Hotel

Atlantic Airways skipar fyri vikuskiftisferð til Reykjavíkar, fríggjadag til mánadag, við innivist í tveymanskamari við morgunmati á Viking Hotel í Hafnarfirði, bert 15 min í bili frá Reykjavík. Leygarkvøldið verður Víkingaveitsla í Fjørukránni við mati, drekkivørðum og undirhaldi.

Fyri hvønn í tveymanskamari
2.826,-

Bilaleiga
Eisini ber til at leiga bil fyri alt vikuskifti fyri bert **kr. 1.020.-**

Íroknað er ferð báðar vegir, gisting, víkingaveitsla og ferðaavgjald.

**Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.**
Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR 355 355


# Matinè í Christianskirkjuni



Leygarmorgunin klokkan 11.30 verður matinè í Christianskirkjuni í Klaksvík. Á skránni verður tónleikur, sum musikkskúlanæmingar og kvinnukórið, Suð, fara framføra.

Millum annað hoyra vit Suð við nútímans klassiskum kórsangi hjá fransmanninum, Duruflè, og Lacrymosa úr Requiem hjá Mozart. Eisini verða jólasangir á skránni.

Frá Klaksvíkar Musikkskúla fara messingblásarar og ein floytutrio at spæla jólasangir. Eisini fara 4 næmingar, sum vóru til roynd í seinastu viku, at spæla nøkur stutt stykki á klaver, floytu og violin.

Týskvøldið í næstu viku verður árliga jólakonsertin hjá musikkskúlanum. Konsertin verður í Ósáskúlanum klokkan 19.


# Bilar

Nr. 231 • hósdagur • 4. desember 2003 • 77. árg.




Subaru Forester 2,0 PQ AWD Turbo:

# Praktiskur og kvikur stationcar og »off-roadari«



*Subaru Forester 2,0 PQ AWD Turbo er ein kvikur og væl koyrandi bilur við 177 hk*

**Subaru Forester, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1998, er nú komin í eini heilt nýggjari útgávu. Í eini amerikanskari test av 12 líknandi bilum fekk Forester besta karakterin**



*Subaru Forester er ein stationcar við somu eginleikum sum ein « off-roadari»*



*Forester innan. Instrumentborðið er einkult og smart við alu-look í miðjuni og gardanboksini*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Subaru leggja seg ikki so nógv eftir at vera sum aðrir bilar, teir satsa uppá sínar egnu boxermotorar og fýrahjólsdrift, samstundis sum teir eru kendir fyri sínar dygdir sum sera álítandi og slitsterkir bilar.

Søgan hjá Subaru í Japan minnir nakað um søguna hjá svensku Saab verksmiðjuni, báðar byrjaðu sum flogverksmiðjur. Søgan hjá Subaru byrjar í 1917 tá japanarin, Chikuhei Nakajima, stovnar sína egnu fyritøku sum eftir nøkrum árum bleiv størsta flogverksmiðja í Japan.

Í 1946 gjørdu Subaru sín fyrsta skutara, og í 1954 bleiv tann fyrsti bilurin sýndur fram fyri almenninginum. Síðan 1972 hava teir spesialiserað seg í fýrahjólsdrivnum bilum.

**Besta IIHS karakter**

Subaru Forester kom fyrstu ferð á marknaðin í 1998. Forester er ein stationcar við somu eginleikum sum ein "off-roadari". Koyrieginleikarnir eru fult á hædd við nútímans persónbilar, samstundis sum bilurin hevur allar eginleikarnar hjá ein "off-roadara", tá brúk er fyri tí. Í Turbo-útgávuni við 177 hk er Forester ein sera kvikur og lætt koyrdur bilur.

Í eini amerikanskari krasj-test hjá IIHS (Insurance Institute for Highway Safety), fekk Subaru Forester besta karakterin millum 12 aðrar líknandi bilar.

Forester hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir sum t.d. aktivar nakkapútur, ið stuðla høvdið og nakkan, um bilurin verður ákoyrdur aftanífrá.

Eisini er bilurin gjørdur soleiðis, at motorhjálmurin og viskararnir geva eftir fyri at skaða minst møguligt, um ein fótgangari verður ákoyrdur.

Forester er ein miðalhøgur bilur at seta seg inn í. Instrumentborðið er einkult og smart við alu-look í miðjuni og gardanboksini. Smá rúm og hillar eru allastaðni, sum t.d. í gardanboksini, oman á instrumentborðinum, uppi undir loftinum og í hurðapanelinum. 12 volt stikkari er í gardanboksini og í viðførisrúminum. Sum standardútgerð hevur bilurin t.d. airbag framman og í síðunum, klimaanlegg, permanent fýrahjólsdrift (AWD), alufelgur, cruise controll, CD anlegg, fjarstýrt sentrallás, tokulyktir, hita í setrunum, takboylar, og skivubremsur framman og aftan. Prísirnir byrja frá kr. 304.800.

### Subaru Forester 2,0 PQ AWD Turbo

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,0 litur 4. syl. boxermotor 177 hk |
| 0-100 km/t: | 8,8 sek |
| Bensinnýtsla: | 12,8 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd: | 205/70-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 445,0 cm |
| Breidd | 173,5cm |
| Hædd | 159,0 cm |
| Eginvekt | 1485 kg |
| Viðførisrúm | 387 litrar |
| Garanti | 3 ár / 100.000 km |
| Prísur: | kr. 343.800,- |
| Søluumboð | P/F D.B. Bilar<br>J. Broncksgøta 15<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 310600 |